# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Formaðurin spælir við eld

Uttan at fara inn á støddfrøðiligu síðurnar av málinum um Føroyar sum eitt valdømi, kann ein uttan víðari staðfesta, at uppskot tingformansins um Føroyar sum eitt valdømi er eitt politiskt eldfimt mál. Onkur vil møguliga fara so langt sum at kalla tað fyri eitt statskvett. Sum samfelagsgongdin hevur verið síðan heimastýrislógina, so má ásannast, at nógv talar fyri einum valreformi. Galdandi vallóg við lutbundnum vali í sjey valdømum við eykatinglimum sum útjavnandi tátti er ikki í samljóði við tíð og samfelagsbygnað. Menningin er stór og broytingar í undirstøðukervinum eru stórar. Í hesum meldri er sum vera man ótti á øllum uttan fyri høvuðsstaðin fyri at gerast við sviðið soð.

Verandi valskipan er ein trygdin fyri, at ikki øll menning og øll útbygging fer fram í meginøkinum. Hetta er í hvussu so er tað, sum mong halda, og nakað er ivaleyst um hetta. Hinvegin má ásannast, at útbyggingin av samfelagnum helst hevði verið meira rationell og betur planløgd, um løgting og landsstýri ikki støðugt noyddust at hava fyrilit fyri teimum landspørtum, sum eru uttan fyri meginøkið. Er ein sannførdur um, at verandi valskipan veitir trygd fyri varðveiting av einum búsetingarmynstri, sum vit øll innast inni ynskja varðveitt, so er sera torført at góðtaka eina so radikala fyri ikki at siga kollveltandi broyting við Føroyum sum einum valdømi. Men øll munnu tó ásanna, at verandi skipan gevur trupulleikar, sum fara at standa við og vaksa.

Tað eru mong, sum undrast yvir, at tingformaðurin, sum meira ella minni er hevjaður yvir flokspolitikk, her stutt fyri løgtingval kmeur fram við einum so kollveltandi uppskoti. Tingformaðurin veit betur enn nakar annar, hvussu eldfimt hetta mál er. Hetta kann elva til órógv og ósemjur í samgonguni, og hetta kann enntá loysa út eitt val í ótíð. Hetta er óheppið, tí nógv týðandi mál eru enn óloyst og endar hetta við, at málið fyllir so nógv í samgonguorðaskiftinum, at arbeiðsfriðurin er hóttur, hevur løgmaður lítið í at velja.

Tá hetta er sagt, so slepst ikki uttan um at hyggja at valskipanini. Floksformenninir kundu roynt at funnið eina semju um at seta ein bólk av serfrøðingum, sum kundu komið við tilmælum, sum tryggjaðu øll neyðug fyrilit og sum løgting og almenningur kundu fingið høvi at viðgjørt í friði og náðum og ikki í skundi. Hetta er eitt sera álvarsamt mál, sum hevur uppiborðið eina seriøsa nágreinliga viðgerð í øllum samfelagsins liðum.

**Sosialurin**

# Ferðavinna

**TH. M. SMITH**



*Kom til Føroya vakrastu oyggj.*
*Vágur er perlan í Suðuroy.*
*Millum blómur við Tvøroyar Fjørð.*

Bjørgini fyri vestan og øll eiðini ..........jú, satt er tað, vøkur er oyggin, eingin ivi er um tað. Men, tað man mangan vera keðilig støða at vera í hjá kunningarstøðunum í

Suðuroy, tá ið ferðafólk vitjar og koma við teimum vanligu spurningunum um umstøðurnar á vegastrekkjunum til tey plássini, tey ætla sær at fara til.

Ein farleið er niðan á Beinisvørð. Hon er uttan iva tann, sum liggur fremst í huga við sínum stórbara útsýni á bjørgini fyri vestan hjá ferðandi at uppliva, báði hjá fremmanda fólki, men so sanniliga eisini hjá okkum føroyingum.

Men, hvussu eru so umstøðurnar, sum verða bodnar okkum? Úr Lopra um Hestin og oman til Sumbiar er ein gamal, smalur vegur, sum liggur sera vakurt í lendinum. So leingi asfaltið hevur verið hildið við líka, hevur tað verið ein frægd at koyrt eftir honum báði við bili, og ikki minni við motorsúkklu við einari passaliga friðarligari ferð. Tó, bara síðan í fjør er hesin vegurin so nógv versnaður, at um hann ikki verður bøttur, er illa hugsandi, at nakar hættar sær at koyra meira um Hestin, í hvussu so er ikki í næsta ár longu, so skjótt versnar ein sovorðin vegur, sum bara sleppur at liggja í órøkt.

Fyrst í maimánað vóru vit báðir vinmenninir Robert og eg ein biltúr norðuri við Riskivatn. Tað er eisini ein nattúruupplivingat koyra tann túrin. Mann kemur so høgt upp, at útsýnið er bergtakandi – niður í Botn – niður á Saksaberg, og so oman yvir

Vágsbygd. Eitt satt undur fyri sjón og sansir. Men gakk, sannheitin var tann, at vit komu nærum í óføri, longur vit komu burtur úr bygdum – at enda sum at koyra ígjøgnum urðargrót.

Slíkar umstøður kann mann ikki bjóða ferðandi, hvørki fremmandum ella okkum sjálvum.

A veg oman aftur til Vágs møttu vit gomlum kenningi, og spurdu, um hann visti hvør ið hevur ábyrgdina av hesum vegastrekki. Honum vitandi eru tað Sev og Landsverk. Tað mátti verið ráð til at lagt nakað av asfalti á hesar smølu vegirnar tá ið krevst, í hvussu er somikið, at tað ikki verður hættisligt at koyra eftir. Heldur ikki hevði verið av vegnum at havt eitt nossligt skýli við wc og vaski á leiðunum, serliga á Sumbiarvegnum.

Alt gott um tunnlar og aðrar hentleikar til frama fyri vinnulív og trivna annars, men verða teir vøkru fjallavegirnir ikki varðveittir í góðum standi, fer ongantíð at eydnast at bjóða Føroyar fram sum ferðamannaland. Eingin tímir at offra í túsundavís at koma til Føroyar at "fresa" ígjøgnum eitt ótal av meir ella minni ógvusligum holum undir tungum fjøllum og sundum, og so koma uppundan aftur hinumegin og gnýggja eyguni sum ein moldvørpa. Tað verður bara ein effektivur máti at halda ferðafólki burtur higani.

So fæst eingin vinna burtur úr.

# Sambandsflokkurin gjørdi rætt

**BJARTI THOMSEN**



Nólsoy,
form. í Føroya Væl,
valfelag Sambandsfloksin í Suðrstreymi

Á seinasta løgtingsvali, 20. januar 2004, bleiv Sambandsflokkurin størstur við 7.501 stemmum, 580 stemmur framman fyri næststørsta flokk, Javnaðarflokkin. Sambandsflokkurin kom í breiða samgongu og fekk landsstýrismenn í fíggjarmálum og fiskivinnumálum. Bárður Nielsen og Bjørn Kalsø hava røkt hesar landsstýrissessir fyrimyndarliga.

Men boð eru eftir góðum fólki. Bárður bleiv 'headhuntaður' og fekk tilboð um sera avbjóðandi starv fram um ein hóp av vælkvalifiseraðum umsøkjarum. Tískil segði hann landsstýrissessin frá sær, hóast hann treivst í hesum starvi.

So mátti annað fólk finnast í staðin. Tingmanning Sambandsfloksins vísti beinanveg formanninum Kaj Leo Johannesen álit, men hann bar seg undan, tí trygd fekst ikki fyri, at Sambandsflokkurin varðveitti tingsessin hjá formanninum.

Á spennandi fundi tað mesta av einum fyrraparti, har nógv nøvn vóru á skránni, samdist leiðslan í Sambandsflokkinum um at peika á Magna Laksafoss sum nýggjan landsstýrismann. Fá fólk í Føroyum munnu vera so væl kvalifiserað til hetta starvið sum Magni. Magni er útbúgvin cand. polit. (tjóðar-búskaparfrøðingur) frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn og hevur arbeitt innan hetta øki bæði í Føroyum og í Grønlandi. Magni hevur eisini royndir frá nógvum ymiskum greiningum um føroyska og grønlendska búskapin og eisini sum limur í Búskaparráðnum. Tískil er hann sum skræddaraseymaður til starvið sum landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Sum formaður í veljarafelag Sambandsfloksins í Suðurstreymi vil eg hervið ynskja Magna Laksafoss hjartaliga tillukku við nýggja starvinum og blíðan byr við hesi stóri avbjóðing.

Sambandsflokkurin tók røttu avgerðina, og hetta kemur at styrkja flokkin enn meir. Vilt tú verða við til at styrkja Sambandsflokkin kann tú gerast limur á heimasíðuni www.samband.fo ella ringja á tel. 318870 ella 312492.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.